# Bilur fór út av vegnum

Hóskvøldið um hálvgum átta tíðina fór ein bilur niðan av vegnum í Hósvík. Alt bendi á, at førarin misti tamarhaldið á bilinum, sum so fór av vegnum. Bilurin var á veg suðureftir, tá óhappið hendi. Ongin fólkaskaði var, og løgreglan sigur, at bilurin fekk heldur ikki so stóran skaða.

**-sae-**



*Onkuntíð kann tað koma fyri, at ferðsluóhapp henda, uttan at tey verða fráboðað til løgregluna. Í øllum førum vistu hvørki løgreglan í Runavík ella í høvuðsstaðnum nakað um hendan bilin, sum myndamaður á Sosialinum kom framvið millum Hósvík og brúnna yvir um Streymin leygardagin*

## Knallertóhapp á Sandi

Leygamorgunin varð ein 18 ára gamal drongur av Sandi fluttur á Landssjúkrahúsið við skaðum eftir eitt óhapp á síni knallert

Óhappið hendi um fýratíðina leygarmorgunin. Løgreglan veit ikki at siga, júst hvør orsøkin til óhappið er. Óhappið hendi beint við Eldhús heima á Sandi. Drongurin varð sum sagt fluttur á Landssjúkrahúsið við brotnum beini og skaðum í høvdinum.

**-sae-**

# Hafnia fingið nýggja telefonskipan



*Ása Johnsdóttir á Hotel Hafnia og Brian Rosendahl av Føroya Tele vísa á nýggju telefonskipanina á Hotel Hafnia, sum Føroya Tele hevur veitt hotellinum. — Hetta er ein liður í endurnýggjan og modernisering okkara, sigur Ása Johnsdóttir, sum saman við manningini á Hafnia er kundi nr. 20 við Meridian vekslaraskipanini*

**Eftir at hava havt gamla telefonskipan síðani 1986 hevur Hotel Hafna nú fingið nýggja vekslaraskipan, sum Føroya Tele hevur veitt teimum. Hotel Hafnia er kundi nummar 20, sum nýtir nýggja Meridian telefonvekslaran**

TELEFONVEKSLARI
*Heini í Skorini*
*heini@sosialurin.fo*

- Við tað at krøvini hækka støðugt og vit tískil eru noydd at modernisera og endurnýggja, er nýggi telefonvekslarin ein liður í menningini av hotelli okkara.

Soleiðis sigur Ása Johnsdóttir á Hotel Hafnia í sambandi við, at hotellið er kundi nummar 20, har nýggja Meridian telefonskipanin verður installerað. Ása Johnsdóttir heldur avgjørdar fyrimunir vera við nýggju skipanini, bæði administrativt og fyri kundan.

- Í staðin fyri at vit skulu vekja 20 fólk somu tíð, er nú møguleiki at installera eina digitala veking til kundar okkara, og tað er bert eitt av fleiri dømum um fyrimunirnar við hesi skipan, sigur Ása Johnsdóttir. Umframt hetta kunnu gestir eisini leggja eini boð, um neyðugt er, og við slíkum fyrimunum metir Ása ikki, at prísurin er ov dýrur.

- Alt er relativt, tá tað kemur til kostna, men vit meta avgjørt, at nýggja skipanin er til fyrimuns uttan at nøkur króna fer til spillis, sigur Ása Johnsdóttir, sum er sv royndastu starvsfólkum á Hotel Hafnia.

### Kundi nummar 20

Føroya Tele hevði eitt lítið hátíðarhald á Hafnia seinasta fríggjadag, tí sum sagt er Hafnia stovnur ella fyritøka nummar 20, sum fær Meridian telefonvekslaran installeraðan.

- Fyrsta Meridian skipanin í Føroyum varð tikin í nýtslu í 1997, og var tað flogvøllurin, sum fekk slíka skipan installeraða. Í dag hevur Føroya Tele so veitt 20 kundum hesa skipan, sigur Brian Rosendahl av Føroya Tele.

Meridian vekslaraskipanin er ein skipan hjá kanadisku telefyritøkuni Nortel, sum er millum størstu telefyritøkur í heiminum. Skipanin er fyrsta digitala teleskipanin í heiminum, og millum 50 og 700 brúkarar kunnu samstundis nýta telefonina á Hotel Hafnia í dag.

Tað hoyrir eisini við til søguna, at Hotel Føroyar hevur fingið modernaðu teleskipanina installeraða, og væntar manningin á Føroya Tele, at vekslaraskipanin verður meiri og meiri eftirspurd í framtíðini.

# Føroyar eru við í Norðurlendskari kommunuverkætlan

**Týsmorgunin fóru tvey umboð frá Granskingardeplinum fyri Økismenning niður á Roskilde Universitets Center at leggja fram fyrsta útkast av eini kommunuverkætlan, sum øll Norðurlondini luttaka í**

FRAMLØGA
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

Tær báðar Martha Mýri og Olga Biskopstø hava í eina tíð nú arbeitt við eini verkætlan, sum ber heitið Stovnar og nýskapandi tiltøk. Henda verkætlanin hevur til endamáls at kanna, hvørji nýskapandi tiltøk, tað veri seg vinnulig, almenn, mentanarlig og sosial, eru framd seinastu 5-10 árini. Hví tey vóru framd, og hvønn leiklut kommunan hevur havt í hesum.

Hetta arbeiðið verður gjørt í øllum Norðanlondunum, og tað verður stýrt úr Noreg. Tað er komið so mikið væl áleiðis nú, at stundin er komin til, at øll hittast til eina framløgu, har síggjast kann, hvørja kós tey, sum arbeiða við hesum, eru á.

Martha Mýri sigur, at verkætlanin í Føroyum fevnir um tríggjar kommunur, Fuglafjørð, Gøtu og Leirvík.

Verkætlanin byggir á samrøður við bý og bygdarráðini og við umboð fyri vinnu, almennu tænasturnar og áhugabólkar. Arbeiðið er sum sagt ikki liðugt enn, men tað, sum tær báðar fara at leggja fram í Roskilde, er ein fyribils niðurstøða út frá tí, sum tær higartil hava kannað.

Tær hava staðfest, at tá tað kemur til nýskapan í einari kommunu, so er tað ofta ikki kommunan, sum virkar sum undangongumaður. Men heldur er tað vinnulívið ella fólk, sum skulu prógva seg sjálvi, og síðani stuðlar kommunan teimum.

– Tað er líka sum okkara fyrsta inntrykk, og tað verður tað, sum vit fara at tosa um, sigur Martha Mýri. Hon leggur at enda afturat, at tá tosað verður um nýskapan, so er tað ikki ein spurningur um nakað heilt nýtt, sum ongin visti um frammanundan.

– Vit taka støði í tí einstøku kommununi og síggja so, hvørji nýskapandi tiltøk eru sett í verk í júst hesi kommununi seinastu 5 – 10 árini, sigur Martha Mýri.








*Óla Svend Nolsøe og Einar Waag, stjórar á Restorff og Føroya Bjór, vænta avgjaldið á sodavatni fara at lække søluna*

*Myndir: Jens K. Vang*

# Bryggjaríini drukna í avgjøldum

**Bryggjaríini øtast um avgjaldið, sum verður lagt á sodavatn. Tey vænta minni sølu av sodavatni, og tað harmast tey um. Hinvegin rokna tey ikki við, at tenninar hjá børnum batna, og tí halda tey avgjaldið hava eittans endamál: At økja um inntøkur landskassans**

AVGJØLD
*Ingi Rasmussen*
*ingi@sosialurin.fo*

Til dagliga kappast tey harðliga. Restorffs bryggjarí og Føroya Bjór. Men í einum eru tey samd. Tey øtast um, at landsstýrið hevur gjørt av at leggja stór avgjøld omaná sodavatn.

Sambært uppskotinum til fíggjarlóg fyri 2004, sum landsstýrismaðurin við fíggjarmálum legði fram í síðstu, so skal eitt avgjald á tríggjar krónur leggjast oman á hvønn litur av sodavatni og leskidrykkjum, sum verða seldir í Føroyum.

Hetta skal geva landskassanum eina meirinntøku á 10 milliónir krónur, sæst í uppskotinum til fíggjarlóg. Sagt verður, at talan er um eitt heilsuavgjald, sum skal minka um søluna, men samstundis er ætlanin, at landskassin skal fáa meira í kassan.

– Tað hevur leingi nervað heilusmyndugleikarnar í Føroyum eins og aðrastaðni í vesturheiminum, at mat- og drykkjuvanarnir hjá fólki eru vorðnir støðugt ósunnari. Landsstýrið hevur sett sær sum mál, at upplýsa um henda vandan, men eisini beinleiðis at ávirka atburðin hjá fólki, soleiðis at nýtslan av ósunnum vørum verður minni, sigur Karsten Hansen afturvið uppskotinum til fíggjarlóg.

Bryggjaríini ivast stórliga í motivinum hjá landsstýrinum.

> Vit skulu vera skattainnkrevjarar hjá landinum, og tað er ikki serliga hugaligt.
>
> *Einar Waag, stjóri á Føroya Bjór*

### Skattakrevjarin Waag

Á Føroya Bjór vænta tey, at avleidda avleiðingin av avgjaldinum verður nógv størri enn tær tríggjar krónurnar, sum fara omaná hvønn litur.

Einar Waag stjóri sigur, at prísurin á hálvum øðrum litri á sodavatni, sum í dag er 12 krónur, fer at vera einar 26 krónur, tá av tornar. Tað grundar hann á, at avgjaldið skal á útsøluprísin, síðan skal keypmaðurin hava vinning og at enda kemur MVG-ið omaná.

– Vit vænta, at prísurin hækkar mangt slíkt enn tað, sum kemur omaná í avgjaldi. Tað fer at ávirka okkum heilt betýðiligt, og tað fer sjálvandi at síggjast aftur í úrslitinum frameftir, sigur Einar Waag.

Úrslitið hjá Føroya Bjór var góðar 700.000 krónur í avlopi í fjør, og stjórin harmast um, at hann í framtíðini skal rinda burturav, tí at landskassanum vantar pening.

– Hetta er so skítbýtt. Teir billa fólkum inn, at hetta snýr seg um heilsu, men tað hevur einki við heilsu at gera. Hetta er júst sum 70-árunum. Tá teimum vantar pening knalla teir punktgjøld á okkum vinnurekandi. Næsta ár verður tað sikkurt ein króna afturat. Um tað ikki skal vera hykl, so mugu vit eisini hava minni avgjald á Jolly Light og Sitrus, men tað vænti eg ikki fer at henda, sigur Einar Waag.

Hann vísir á, at aðrastaðni verður farið hinvegin, fyri at gera umstøðurnar hjá vinnuni góðar. Í Danmark lækkar prísurin á bæði spiritus, tubbakki og sodavatni. Hjá okkum snýr tað seg bara um at økja um inntøkurnar hjá landskassanum, nú tað sansar at, og samgongan hevur lovað skattalætta.

– Vit skulu vera skattainnkrevjarar hjá landinum, og tað er ikki serliga hugaligt. Vit skulu krevja einar 10-15 milliónir krónur inn fyri landið í skatti, og tað var ikki tað, eg ætlaði, sigur Einar Waag.

### Krassa í kassan

Óla Svend Nolsøe, stjóri á Restorff, ivast stórliga í, um børnini fáa minni brendar tenn av avgjaldinum, sum verður lagt á sodavatn, men tað kann ávirka søluna, heldur hann.

– Eftir hesum at døma fer prísurin á sodavatni upp, og tað ávirkar vanliga søluna tann skeiva vegin. Men tað er hinvegin ikki sikkurt, at tað ger tað, sum frá líður, og tí er heldur ikki vist, at børnini fáa betri tenn. Tað er heldur ikki endamálið við avgjaldinum, tí meiningin er bara at krassa meiri pengar í landskassan. Um teir høvdu so stóra neyð av heilsuni hjá fólkum, so varð avgjald lagt á feitan seyð og grillbarrir, men tað er lættari at fara eftir okkum, sigur Óla Svend Nolsøe.

> Meiningin er bara at krassa meiri pengar í landskassan. Um teir høvdu so stóra neyð av heilsuni hjá fólkum, so var avgjald lagt á feitan seyð og grillbarrir
>
> *Óla Svend Nolsøe, stjóri í Restorffs bryggarí*

Restorffs hevur einki serligt úrslit at vísa fyri síðsta ár. Eftir skatt vísti ársúrslitið eitt hall á roknskapinum upp á meira enn 700.000 krónur. Men hóast Óla Svend Nolsøe ikki tekur undir við avgjaldinum, so óttast hann tað heldur ikki beinleiðis.

– Vit hava havt eina javna sølu av sodavatni, hóast kappingin frá teimum útlendsku hevur verið stór. Higartil hava vit bara selt hálvar litrar í fløsku, men nú eru vit farin at selja størru fløskurnar eisini, so sølan bara økist fyri okkara viðkomandi, og hetta avgjaldið fær neyvan søluna í botn, sigur Óla Svend Nolsøe.

Hvussu er og ikki. Landsstýrismenninir í bæði fíggjarmálum og familju- og heilsumálum tvíhalda um, at talan er um heilsuavgjald, sum skal bøta um tenninar hjá børnum. So kunnu fólk bara undrast á, prísurin samstundis hækkar á mjólkini.